Sosialurin

Nr. 174 - 10. september 2007

BISPAVALIÐ s. 18–20

*Orð: Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Myndir: Edith Johannesen*

# Ein løgin veljara

*Kirkjuráðslimirnir í Læraskúlahøllini leygardagin til fyrsta valfundin í samband við bispavalið borðreiddu ikki við spurningum um tey heilt djúpu viðurskiftini sum murra í kirkjuni. Tey vóru spøk og fitt*



Uni Næs:

## Bispur skal vera savnandi

Tað eru 14 prestagjøld í landinum, 22 prestar og fimm av teimum vilja verða bispar og avloysa Hans Jacob Joensen, sum nú leggur frá sær. Uni Næs, sóknarprestur í Fuglfjarðar prestagjaldi, er ein teirra og hann er ikki í iva um hvørs fremsta uppgáva biskups er.

- Bispur skal vera savnandi í orði og verki. Vit mugu tosa um innihald í kirkjuni og tað er áhaldandi at boða um Jesus, segði hann, sum tann fjórði, ið slapp framat at agitera fyri sær sum ovasti í nýyvirtiknu fólkakirkjuni í Lærarskúlahøllini leygardagin.

-Tað snýr seg um góð kor hjá kirkjuni at virka undir. Eg vil virka fyri at gera kirkjuna meira opna. Eg haldi, tað er ov lagt millum kirkjuráðini og stiftsstjórnina, segði Uni Næs.

Uni helt eisini at barna og ungdómsarbeiði átti at styrkjast. Tey eru framtíðin legði hann áherðslu á.

-Vit eiga at fáa fleiri prestar innan serøki. Vit fáa ikki børn og ung í kirkju og tí kundi tað verið ein máti at rokkið hesum við at sett eitt nú ítróttarprestar, segði Uni Næs.

Uni Næs vísti á, at uppgávurnar hjá prestum øktust, og tí áttu fleiri prestastørv at normerast. Um bispastarvið segði hann, at hetta fyrst og fremst var eitt hirðastarv og tað merkir, at bispur skal verða hirði hjá øllum prestunum og allari fólkakirkjuni.



*Tey ungu koma ikki í kirkju og Uni Næs, bispavalevni heldur at ein gongd leið er at seta ítróttarprestar, sum røkka teimum ungu*

**Frásøgn**

66 fólk. Fimm bispavalevni, tveir journalistar, tvey myndafólk og gott hálvthundrað kirkjuráðslimir og prestar. Hesi mannaðu tann fyrsta hálvalmenna bispavalfundin í Føroyum nakrantíð leygardagin seinnapart, tá íð hann byrjaði klokkan trettan minuttir yvir fýra.

Hevur tú verið journalistur í mong ár, tá hevur tú gjørt ov lítið, um tú ikki hevur verið fyri mongum løgnum, og søguligi veljarafundurin í Lærarskúlahøllini leygardagin seinnapart er allarhelst eitt tað løgnasta føroyska tiltak pressan nakrantíð hevur verið vitni til. Journalistar hava vanliga ein veikan varhuga um hvat fer at henda undan einum tiltaki og hvat teir kunnu hava heim aftur við á blokkinum eftir fundin. Leygarkvøldið battu ikki 25 ára royndir. Onki bleiv sum undirritaði hevði roknað við.

Hetta var ein afturlatin veljarafundur fyri innbodnum, fyri kirkjuráðslimum og pressan var boðin við fyri at greiða almenninginum frá hvat fyrifórst, tó í innbjóðingini var staðiliga víst á, at pressan ikki mátti seta spurningar. Tí er hendan reportasjan eitt sindur amputerað hvat innihaldi viðvíkur, haldið okkum til góðar, lesari.

Longu í gongini kundi tú merkja elektriska stemningin. Her var spenningur og fólk vóru spent at hoyra valevnini. Um tað var av tilvild eydnaðist ikki at fáa fram, men bispur var ikki boðin við, og tað undraðist dómprósturin Bjarni Bæk óalment á undan fundinum.

Uppleggið til fundin var, at tey fimm valevnini fingu 10 minuttir hvørt til eina framløgu.Tað er samankók av henni, sum eru endurgivin í smærru greinunum í framhaldi av hesari í blaðnum í dag. Síðan var høvi hjá kirkjuráðslimunum at seta fram spurningar og valevnini fingu at enda nakrar minuttir við seinastu sannførandi orðunum til teirra veljarar.

Vanliga á einum veljarafundi, so snýr tað seg um hjá valevnunum at sannføra veljarar, at tey eru tey einastu røttu til tað sum veljast skal.

Hetta var fyrstu ferð í søguni, at menn og kvinna stilla upp til eitt bispaval í Føroyum og talan er ikki um politikkarar, men prestar, sum av starvsins eyðkenni, eru fyrimynd hjá teirra sóknarbørnum. Teir høvdu eina heilt ómøguliga uppgávu frammanfyri sínum veljarum. Teir skuldu sannføra, og so skuldu teir verða hampuligir og ikki loypa fram av. Teir kundu verða illir inn á kappingarneytarnar, men tað skuldi verða innantanna og kundi “allernådigst” sýnast við eitt sindur av roða í andlitinum.

Prestarnir vóru fullkomiliga óvanir við hesa støðuna. Teir flestu hava í mong ár sitið í tryggum starvi, sum teir hava søkt, tí teir høvdu pappirini í lagi. Nú vóru onnur krøv, nú skuldu teir sannføra veljaran í kapping við aðrar, at teir vóru teir røttu. Talan var ikki um nakra vanliga starvssamrøðu. Teir skuldu sannføra upp á ein so skikkiligan máta sum gjørligt. Ein fullkomiliga ómøguligt uppgáva fyri vanlig fólk, ein uppgáva teir allir sum ein megnaðu til fullnar.

Tað var týðuligt, at spenningurin var stórur millum valevnini. Teir skuldu sannføra og teir skuldu helst verða betri enn kappingarneytarnir og samstundis skuldu teir vanda sær um orðini. Teir livdu upp til sloganið í donsku sjómanskirkjuni: “Her taler vi pænt til hinanden” uttan mun til hvussu ósamdur ein er. Brigsl og aðrar menniskjaligar giftigheitir vóru ósagdar og ongantíð annað enn tankar hesar tímar fyrsta stigið fram móti bispaembætinum varð tikin. Ein fór við sigrinum, fýra sleiktu sárini.

Og úrslitið var sjónligt og tamt. Pallborðið smeyg sær smidliga uttanum tey stóru evnini, tey evnini sum veruliga upptaka vanliga føroyingin. Djúpir spurningar um uppaftur giftu og korini hjá teimum samkyndu vóru

